Nú kemur Húsakórið:

# Húsagongd úr Danmark til Føroya við sangi og gleimi

Húsakórið í Keypmannahavn er gamalt føroyskt kór við traditiónum. Húsakórið seta tey flestu í samband við útisetar í Keypmnnahavn og rætt er tað, men talan er bæði um fyribils útisetar og tey, sum eru meira tilkomin, og sum hava fastan bústað í danska høvuðsstaðnum. Men fyri fyrstu ferð vitjar kórið heim á klettarnar, so í næstum fáa føroyingar vitjan av Húsakórinum, og kórið vitjar í Vestmanna, Vági, Fuglafirði og í Norðurlandahúsinum

KÓRVITJAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fyri teir flestu av oyggjabúgvum okkara stendur heitið "Húsakórið" óivað í eini romantiskari og gleðisskygdari glæmu. Og hetta annaðhvørt tí oyggjabúgvar sjálvir sum fastlandsbúgvar á yngri árum hava verið partur av kórinum, ella teir har hava notið gott av tónavirksemi kórsins, eina mest í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, har kórið heldur til, eins og føroyingar flestir, ið staddir eru í danska høvuðsstaðnum.

Kórið er ein av trúgvu og drúgvu táttunum, ið tengdir eru at drúgvu søgu føroyinga í útlegd og at Føroyahúsinum.

Men ferðir til Føroya eru ikki gerandiskostur, í veruleikanum púra ókendar, men í næstum fáa føroyingar høvi at at hoyra føroyingar í Keypmannahavn á kórvitjan í Føroyum. Húsakórið kemur nevniliga á vitjan og ferðaskráin er henda:

| | |
|---|---|
| Týskvøldið | 12.10.04 |
| kl. 20.00 | Vestmanna skúla |
| Mikukvøldið | 13.10.04 |
| kl. 20.00 | Vágs kirkju |
| Fríggjakvøldið | 15.10.04 |
| kl. 20.00 | Fuglafjarðar kirkju |
| Leygardagin | 16.10.04 |
| kl. 16.00 | Norðurandahúsinum |

Sangskráin er ógvuliga fjølbroytt. M.a. hevur kórið frumframførslu av einum nýggjum verki, sum Pauli Hansen hevur komponerað, Pauli er vágbingur, búsitandi í Havn. Orðini eru eftir Tummas Napoleon Djurhuus. Tað snýr seg um tann partin av samlaðu yrkingum hansara, sum kallast Sólarmessa. Av øðrum kann nevnast Negro Spirituals, føroyskir og norðurlendskir sálmar og sangir, verk av Niels W. Gade, av Felix Mendelssohn Bartholdy og mongum øðrum. Eisini hevur kórið ein sang, sum ein kórlimur - Sámal Matras Kristansen - hevur gjørt orð og lag til.

## Drúgv søga

Søga kórins er long. Mong eru tey, sum á einhvønn hátt er tengd at kórinum, sum ber føroyskan arv og framtíðar anda fram í Keypmannahavn. Fyrrverandi útisetar og kórlimir, ella bara njótarar av kórsangi, og sum nú eru aftur í Føroyum, kenna kórið. Eisini fólk, sum varða av teimum, ið á einhvønn hátt eru, ella hava verið, partur av kórinum. Og so tey, sum eru støðugur grundarsteinur og teirra avvarðandi.

Ein av limunum sigur soleiðis:
- Tað sita nógv fólk heima í Føroyum, sum onkuntíð hava sungið í Húsakórinum. Hvussu nógv veit ongin, tí tíverri finst ongin limalisti - bert frá teimum seinastu 3 árunum. Men flestu bygdirnar í Føroyum hava nokk verið leverandørar av kórlimum í gjøgnum tíðina.

Kórið hevur eisini sera stóran sosialan týdning fyri útisetar í Keypmannahavn, bæði fyri ung lesandi, og tey meira tilkomnu fastbúgvandi.

Forkvinna í kórinum er Astrid Viderø. Kórið er gamalt og hevur søgu og mangir kórleiðarar hava leitt kórið.
Lat okkum hoyra formannin greiða frá, samantvinnað við eitt sindur av agni av alnótini:

- Tað kann sigast, at Húsakórið tók arvin upp eftir teimum gomlu studentarkórunum, sum byrjaðu í 30'unum. Kórið fekk navnið Húsakórið, tá tað varð sett á stovn í Føroyahúsinum í Store Kongensgade 108, og Christian Wahl stjórnaði. Hetta var umleið 1970.
Kórið hevði ymiskar kórleiðarar tey fyrstu árini, men frá 1978 og til mars 2000 var Marianne Clausen, dóttir Karl Clausen, kórleiðari. Í mars 2000 tók kenda føroyska tónaskaldið Sunleif Rasmussen leiðsluna av kórinum. Í september 2001 tók Tórur á Brúnni við eftir Sunleif.

- Umframt at vera við í ymiskum tiltøkum í Føroyahúsinum, hevur kórið uml. 8 konsertir um árið. Tað er vorðið siður, at kórið luttekur í føroysku gudstænastuni 2. jóladag í Samuelskirkjuni á Nørrebro. Gudstænastan verður útvarpað í Danmarks Radio P1. Húsakórið tók, saman við fyrisitingini í Føroyahúsinum og Grønlændernes Hus, í 1998 stig til eina árliga Norðuratlantiska Jólakonsert í desember mánaða, við luttøku av føroyskum, grønlendskum og íslendskum kórum í Keypmannahavn. Konsertin verður hildin í Helligaandskirken, Strøget. Ein ella tveir jólasangir verða sungnir sum felagssangir á teimum fýra ymisku málunum.

- Síðan 1996 hevur verið skipað fyri eini Norðuratlantiskari Kórstevnu. Kórstevnan var í ár hildin á Den Nordatlantiske Brygge og fer framyvir at vera hildin her annað hvørt ár. Hetta er fyrstu ferð, at Húsakórið kemur konsertferð til Føroya. Ofta hevur verið tosað um tað, men so hevur tað peningaliga altíð sett ein stoppara fyri og ístaðin hevur ferðin verið løgd til Svøríki ella Polen, eisini hevur kórið havt konsertir ymsastaðni í Danmark.

- Fyri 2 árum síðani var so støða tikin til, at kórið skuldi til Føroya, og so mátti arbeiðast dúgliga fyri at savna so mikið av peningi saman, at allir kórlimir høvdu ráð at koma við til Føroya, og er hetta nú eydnast. Kórið hevur fingið stuðul ymsastaðni frá, og kórlimirnir hava eisini sjálvir verið sera virknir at savna pening. Húsakórið gleðir seg sera nógv til at koma heim, og ikki minst Tórður á Brúnni, sum flutti til Danmarkar sum 12-ára gamal, siga fyrireikararnir.



Húsakórið setti sín serstaka dám á, tá Norðurbryggjan lat upp í Keypmannahavn fyri einum ári síðani.

Myndir: Jan Müller




## Fleiri við

Í ferðini vera 37 sangarar. Jóanes Nolsøe verður eisini við á ferðini og fer at spæla urgu.

Kórleiðarin Tórður á Brúnni, cand. theol, er føddur í 1963 í Keypmannahavn av føroyskum foreldrum, Frímann S. á Brúnni og sjúkrasystir Mimi á Brúnni Hann búði í Føroyum frá 1968 til 1976. Er útbúgvin á tí Kgl. Danske Musikkonservatorium í 1996. Tórður hevur spælt sum organistur í donsku fólkakirkjuni síðani hann var 14 ára gamalur. Býr í Sorø, har hann síðani 1987 hevur verið tónleikalærari á Sorø Private Realskole. Síðani 1999 hevur hann verið virkin sum kórleiðari.



Færø Expo í Keypmannahavn

# -Eitt Færø sum Færø

"Il faut etre absolument moderne"
("Neyðugt er at vera absolut modernaður").
*Rimbaud*

Leygardagin lat Bredgade Kunsthandel eina framsýning upp við fleiri av teim kendastu føroysku málarunum. Við á framsýningini eru Torbjørn Olsen, Eyðun av Reyni, Amariel Norðoy, Zacharias Heinesen og Kári Svensson. Bredgade er hin fínasta gøtan fyri listahandil í Danmark og staðið har kend listafólk hava framsýningar. Bredgade umboðar alt sum er etablerað og fínt, men hesi gallarí eru tó ikki kend fyri at umboða nýggju listina, ella listina í dag.




UMMÆLI
*Kim Simonsen*

Síðani Norðuratlantsbryggjan opnaði hava vit bæði sæð og hoyrt meiri til t.d. føroyska list í Keypmannahavn. Danskir listasøgufrøðingar skriva bøkur um t.d. Trónda Patursson, men onkur ummælari helt tó hesa bók umboða eina løgna folklorisering og ein serligan uppruna- og náttúrulongsul hjá høvundanum og hjá dønum, ið eg eisini endurfann á Bredgade Kunsthandel.

## Hvør umboðar hvønn?

Í dag síggja vit eina økta gransking í nationalismu, regionalismu og globalisering. Serliga antropologar hava við postkolonialari ástøði víst okkum, at fólkasløg mangan hava skapt teirra mentan (og fína mentan) eftir uppskrift frá hjálandaveldinum. Antropologar hava eisini víst at teir sjálvir mangan skapa tað sum teir granska, tí eftir at ferðafrásagnir hava skapt eina serliga "mynd", ið ofta er misvísandi, byrja fólkini í landinum sjálvi at trúgva á hesar myndir og at endursmíða teirra mentan eftir hesum fyrimyndum, ið síðani skapa ein marknað fyri listahandverk og annað. Eg haldi at hetta passar partvíst alt ov væl um hesa framsýning í Bredgade, ið m.a. eisini er marknaðarførd á forsíðuni á donskum avísum sum "Færø Expo". Teir føroysku listamenninir geva keyparunum tað tey vilja hava, ið er "Færøkunst" og eitt "Færø sum Færø", sum náttúrulyrisk borgarlig sofastykki, púrt uttan misljóð. Undantak eru tó Torbjørn Olsensa kvinnumyndir og onkrar av stóru myndunum hjá Kára Svensson, ið eru spennandi. Eg haldi at nógv av restini er keðilig list, ið akkurát er nóg modernistisk og semiabstrakt, so hon sær út sum um hon er modernað, men er sama regionalistiska heimstaðarlistin, ið so lætt kann gerðast folklorisma, nærri skild við t.d. fosturlandssangin enn ljóðið av føroyska rokkinum. Persónliga eri eg mest áhugaður í nútiðarlist, ið eg haldi kann nógv meiri enn klassiska náttúrumálningalistin nakrantíð hevur kunna, eg eri tí lítið áhugaður í náttúrumyndum, ið man fyri tað mesta skal vera ein eitt sindur romantisk sál fyri at dáma. Tveir dagar áðrenn eg sá hesa framsýning hevði eg eina samrøðu við kendu donsku listamenninar Chr. Lemmers og Michael Kvium, ið mun til hetta var "Færø Expo" sum at traðka inní eina tíðarmaskinu og spola tíðina aftur eini 80 ár.

## Er hetta samtíðarlist?

Bredgade Kunsthandel er ein av teim elstu listahandlunum í Danmark. Hetta gallarí sigur seg arbeiða við at selja klassiska modernismu og samtíðarlist. Men øll sum hava fylgt bert eitt sindur við hugtakinum "samtíðarlist" vita, hvussu torført tað er at avmarka hetta hugtakið. Tosa vit í Danmark um "danska" og "klassiska samtíðarlist " sum Oluf Høst, Cobra við Asger Jorn, Richard Mortensen og Robert Jacobsen, ella um klassiska avantgardulist, sum t.d. poplist, fluxus og Bjørn Nørgaard, um Chr. Lemmers og Michael Kvium ella um Ólafur Eliasson. Hesin seinasti arbeiðir við optiskum intallatiónum, ið broyta lit og skap alt eftir hvussu vit standa í mun til verkið?

Øll sum hava verið á kendum nútíðarsøvnum í stórbýum, sum Berlin, London og Paris vita hvussu ágangandi og deiliga avbjóðandi nútíðarlistin er. Hon er ikki longur eykend av landamarkum, tað er t.d. ógjørligt at siga, at Eliasson er dani, íslendingur ella beinleiðis hvønn nationalitet hansara list umboðar. Tað sama er hent við føroyskum listafólkum sum Hanna Bjartalíð, Rannvá Kunoy, Hansinu Iversen, Sigrun Gunnarsdóttir Niclassen og Anker Mortensen.

Tað hevur leingi borið á henda bógv, at næsta stigið í menningini av føroyska listaheiminum má vera ein radikal nýskapan og at "føroysk" list ikki bert skal umboða tjóðina, náttúruna og heimstaðin, men samfelagið og heimin. Eg veit væl at hetta er fýrakanta, men nærum øll føroysk list er romantisk fýrakanta og heimføðislig og tí eru hesi orð neyðug.

## Positiv ella negativ?

List er sum týski filosoffurin modernistiski fagurfrøðingurin Th. Adorno tók til bæði autonom og ein partur av tíðini og samfelaginum, sjálvt um hetta er ein mótsetningur, tí at tað er samfelagið, ið er til staðar í verkinum, ið skapar viðurskifti millum samfelagið og listaverkið og ikki hvussu listin er til staðar í samfelaginum. Adorno meinti, at list sum beinleiðis vevur samfelagsmál inn í listina er uttan týdning og ov rein list, ið arbeiðir akademiskt við forminum eisini er uttan týdning. Millum hesi er verulig list okkurt sum tekur empiriskar royndir og veruleikan og broytir hann. Adorno dámdi best negativa list, ið var lokað fyri tulking og ikki vil gera seg til eina vøru, sum t.d. tónleikurin hjá Schönberg, tí óskiljandi formur er meiri provokerandi og kritiskur enn tað sum er lagaligt og endurframleiðir stirðnaðar siðir, tí slík list er provinsiel.



Eg havi fyrr undrast um hví so nógvir málarar sum t.d. Zacharias Heinesen, Bárður Jákupsson, Tróndur Patursson, Kári Svensson, Ólivur við Neyst, Amariel Norðoy, Torbjørn Olsen nærum altíð skulu arbeiða við føroyskum landsløgum, hví vit altíð skulu hóma fuglar, fjøll, havið og skip í myndunum og eitt serligt føroyskt farvuspæl hjá nærum øllum hesum listafólkunum, um tey so eru abstrakt sum Ingálvur av Reyni. Er tað neyðugt at mála slíka list fyri at liva sum listafólk í Føroyum? Undir øllum umstøðum, so er hetta alt ov homogent. Eg haldi at hesir føroysku málarar eru stirnaðir og endurframleiða náttúrumálningin, so tað er nærum absurd. Høvdu William og Heðin Brú bert skriva náttúrulýsingar, hevði Janus bert lýst brim og grønan bø, hevði Kári P. bert sungið um brim í Mikinesi, hevði Katrin Ottarsdóttir bert gjørt film um hvussu ljósið skiftir í Mikladali, hevði Eyvør bert sungi um náttúrupplivingar, so høvdu vit hildið tey verið keðilig. Men málarnir tey hava fingið frið við teirra náttúruromantikki, eingin sigur nakað ella undrast yvir at teirra motiv bert kunnu vera av náttúruni (undantøk eru tó sum t.d. Mikines og Smith). Áhugaverdi spurningurin í dag er, hvat er føroysk list? Og hví er hon tað? Skal hon vera "føroysk", sum náttúrulýsingar hjá Amariel Norðoy og Kára Svensson?

Føroysk list er kanska meiri enn vit halda skapt av útlendingum, ið eins og Søren Ryge Petersen vilja hava okkurt serligt reint og upprunaligt og kanska okkurt semiabstrakt "náttúru eitt ella annað", men hesi hava ongan áhuga í gerandisdaginum, lívinum og eksistentiellum temaum hjá føroyingum í dag. Skal ein føroyingur fáa góð ummæli í Danmark skal hann nærum umboða okkurt serføroykst.

## Aðrar leiðir

Tey yngru føroysku listafólkini ganga tó meiri hetrogenar vegir í dag, men hetta tey gera, ið man kann síggja á Bryggjuni og í Listaskálanum av og á, er júst ikki "Færøkunst" og kann tí helst ikki seljast á sama hátt í Danmark. Fleiri av hesum detta sum Adorno í felluna og gerðast hin vegin innilæst í akademiskum formum. Eg hevði vilja at tey heldur kastaðu seg yvir gerandisdagin, ella bert yvir ljós, ljóð og videoinstallatiónir. At tey tordu at sleppa úr jarnbúrinum, ið autonoma verksfatanini eisini er. Eg skilji ikki hví eingin í dag hevur víst á fremmandagerðing og einsemi í okkara tíð á bygd. Hví málar eingin eitt parkeringspláss á nátt, eina svimjihøll (sum Hockney), kioskir, handilsskelti, ein cheesburgara ella ger papmasje standmydnir av vanligum børnum, prætikantum og fantastum - hví er alt sama suppan, hví er eingin munur á tema og evni hjá nærum øllum málarum? Hvar eru bilar, bussar, ung fólk á Vaglinum, ið fríggja har onnur halda møtir ella flaggdagshald. Hvar eru listafólk, ið tora at punktera hvussu føroyingar síggja seg sjálvar, ella vilja síggja seg sjálvar. At vísa okkum fyri tíggju túsundu ferð hvussu Mikladalur ella Mykines, ella ein alda sær út í sól og regni er óoriginalt.

Er hetta føroysk list, so er uppá tíðina at gevast at gera "føroyska list" og skapa eina meiri fjølbroytta list og lata náttúruna sovna á hvíldarheiminum. Skulu vit hava "føroyska list", so haldi eg sum Rimbaud, at neyðugt er at vera absolut modernaður og ein partur av okkara tíð, og sum Adorno, at alt annað er provinsielt.

Færø Expo 2004, Bredgade Kunsthandel, Bredgade 69, 2. oktober til 23. oktober.